FISKIMÁLARÁÐIÐ

Løgtingið
Tinghúsvegur 1-3
Postboks 208
110 Tórshavn

1. november 2021
Mál: 21/21751-2
(at tilskila í svari)

Tygara skriv: 52-064/2021

Svar til fyrispurning 52-064/2021 frá Høgna Hoydal, løgtingsmanni, um avgerðir og treytir landsstýrismansins um játtanir og sýtingar av kvotum til vinnuligar royndir og verkætlanir, haruppií ítøkiligt skipakeyp

Spurningar:

1. Hvussu eru avgerðirnar um og grundgevingarnar fyri at ganga ímóti tilmælunum frá umsitingini um, hvørjum skuldi játtast kvotur til vinnuligar royndir og verkætlanir, haruppií ítøkiligt skipakeyp, skjalfestar, viðgjørdar og grundgivnar fyrisitingarliga?

2. Vórðu upplýsingar og metingar um avgerandi viðurskifti, sum landsstýrismaðurin sigur seg hava lagt dent á sum veruligar umstøður í málinum, skjalfestar og sendar til partshoyringar?

3. Luku teir umsøkjarar, ið landsstýrismaðurin valdi fram um aðrar, sum vóru tilmæltir av umsitingini, tey grundleggjandi høvuðskrøvini í lóg, kunngerð og metingarskjølum betur enn aðrir umsøkjarar? T.e.: nýskapan, virðisøking og menning, skjalprógvaðar keypssáttmálar fyri skip, fígging, rakstrarætlan, at kunna byrja beinanvegin v.m.?

4. Luku teir umsøkjarar, ið vórðu tilmæltir frá umsitingini, men sum landsstýrismaðurin vrakaði, tey grundleggjandi høvuðskrøvini í lóg, kunngerð og metingarskjølum? T.e.: nýskapan, virðisøking og menning, skjalprógvaðar keypssáttmálar fyri skip, fígging, rakstrarætlan, at kunna byrja beinanvegin v.m.?

5. Hvør var munurin í eginpeningi og í royndum at reka fiskivinnu, sum landsstýrismaðurin sigur seg hava lagt dent á, millum teir umsøkjarar, ið fingu játtan og teir, sum vórðu tilmæltir frá umsitingini – og hvussu varð hetta skjalprógvað og grundgivið í avgerðini?

6. Er tað rætt, at umsøkjarar, ið fingu játtan til ítøkiligt skipakeyp, nú hava útvegað skip, sum aðrir umsøkjarar, ið vórðu vrakaðir, høvdu keypssáttmála uppá?

Svar:

Til nr. 1.
Avgerðirnar eru skjalfestar, viðgjørdar og grundgivnar fyrisitingarliga í niðurstøðuskjalinum hjá landsstýrismanninum og í avgerðunum, sum eru sendar umsøkjarunum.

Til nr. 2.
Vísast skal á, at um spyrjarin sipar til atlit viðvíkjandi eginpeningi og royndum hjá stigtakarunum í sambandi við ítøkiligt skipakeyp, so vórðu hesi atlit bert tikin við í síðsta umfari, tá avgerast skuldi, hvørjar tvær av fimm møguligum umsóknum skuldu játtast. Mett var ikki, at tað var neyðugt við partshoyring, tí talan var um upplýsingar, sum umsøkjararnir vórðu bidnir um at upplýsa – og høvdu upplýst – í umsóknarskjalinum. Í leiðbeiningini til umsóknarskjalið er tað serstakt tilskilað, at eginpeningur og royndir skulu upplýsast. Og í metingarskjalinum stendur, at umsóknirnar skulu viðgerast og metast við grundarlagi í teimum ítøkiligu upplýsingunum í umsóknini.

Til nr. 3 og 4.
Í sambandi við viðgerðina er útgangsstøði tikið í sjófeingislógini, kunngerðini um kvotur av makreli, norðhavssild og svartkjafti til vinnuligar royndir og verkætlanir, umsóknunum og teimum skjølum, sum umsøkjararnir sendu við umsóknunum.

Tað kann vera torført at meta um, hvørt ein umsókn hevur við sær meira menning, nýskapan og virðisøking enn ein onnur umsókn. Her er ein heildarmeting gjørd. Eisini hevur landsstýrismaðurin valt at raðfesta verkætlanir, sum heilt ella í stóran mun eru bygdar á uppsjóvarfisk, heldur enn at lata uppsjóvarkvotur til tann partin av vinnuni, ið hevur rímiliga støðugt virksemi grundað á botnfisk.

14 umsóknir um kvotu til skipakeyp komu inn. Av hesum vórðu 5 tilmæltar sum stuðulsverdar ella stuðulsverdar við fyrivarni. Tað er eisini talan um eina heildarmeting, tá endaliga skuldi metast um, hvørjar tvær av hesum 5 umsóknunum skuldu fáa tillutað kvotu til skipakeyp. Í endaligu metingini hevur landsstýrismaðurin eisini lagt dent á fíggingina av verkætlanini í eginpeningi, eins og hvørjar beinleiðis royndir sjálvir stigtakararnir hava til fiskiskap og skiparakstur.

Í slíkari meting vóru tvær ella møguliga tríggjar verkætlanir av teimum tilmæltu, ið luku treytirnar um ávikavist lutfalsligan høgan eginpening og beinleiðis royndir. Samlaði karmurin í tøkari kvotu avmarkar talið av verkætlanum til tvey skip.
Við grundarlagi í hesi meting og fyritreytum varð kvota latin 2 feløgum.

Til nr. 5.
Sum nevnt, vóru tilsamans 5 umsóknir tilmæltar sum stuðulsverdar ella stuðulsverdar við fyrivarni. Viðvíkjandi eginfíggingini lógu hesar frá umleið 1 mió. kr. og upp til umleið 20 mió. kr. í eginfígging. Tann eina umsóknin, sum var tilmælt, men ikki fekk tillutað kvotu, hevði lítlan eginpening. Tær báðar umsóknirnar, sum vórðu játtaðar, høvdu bæði nógvan eginpening eins og at stigtakararnir høvdu drúgvar royndir.

Viðvíkjandi skjalprógvi verður víst til svar upp á spurning 2.
Avgerðirnar eru skjalfestar, viðgjørdar og grundgivnar fyrisitingarliga í niðurstøðuskjalinum hjá landsstýrismanninum og í avgerðunum, sum eru sendar umsøkjarunum.

Til nr. 6.
Tá umsóknirnar komu inn, vísti tað seg, at okkurt skipanavn gekk aftur í nøkrum umsóknum. T.v.s., at nakrir umsøkjarar høvdu eina "keypsoptión" upp á sama skip. Keypið var tó m.a. treytað av, at umsøkjarin fekk tillutað kvotu frá Fiskimálaráðnum.

Sambært umsóknini hjá einum av teimum 14 umsóknunum upp á ítøkiligt skipakeyp hevði umsøkjarin keypsoptión upp á eitt skip, sum annar av játtaðu umsøkjarunum nú hevur keypt.

Jacob Vestergaard
landsstýrismaður